

# Sorin og René nýggjan sáttmála

Felagsliðið í sundalagnum hevur longt um sáttmálan við tveir av leikarum sínum. Rumenski áleyparin, Sorin Angel, hevur skrivað undir nýggjan sáttmála, sum er galdandi fyri kappingarárið 2007. Afturat hon hevur eisini málverjin, Rene Tórgarð, longt sín sáttmála við EB/Streym. Við hesum hevur oddalið tryggja sær framhaldandi samstarv við tveir av týdningarmiklu leikararnar í felagnum.

# Dómaraásetingar í hondbólti

**Atlantic Airways kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| 7/10 kl. 16.00 | VÍF-Kyndil | Karstin Joensen/Kristian Joensen |
| 8/10 kl. 16.00 | Neistin- StÍF | Rúni Mohr/Ragnar Simonsen |
| 8/10 kl. 16.00 | H71-KÍF | Dánjal Samuelsen/Heri Petersen |

**Sunset kappingin:**

| | | |
|---|---|---|
| 8/10 kl. 14.30 | Neistin-StÍF | Rúni Mohr/Ragnar Simonsen |

# Justinusen brøðurnir ikki við

**Neistin tekur í fyrsta dytinum ímóti StÍF í høllini á Hálsi sunnudagin. Neistamenninir hava allar mans tøkar, meðan StÍF má vera Justinusen brøðurnar fyri uttan. Hinvegin ætlar venjarin, Jacob Jónsson, at vera partur av liðnum, meðan tað hoyrist, at eisini Artur Johansen verður við á Hálsi.**

NEISTIN-STÍF
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Atlantic Airways kappingin verður skotin í gongd við einum sonnum braki í høllini í Vestmanna leygarkvøldið kl. 18. Silvurvinnararnir frá í fjør, VÍF, taka ímóti gullvinnarunum úr Kyndli í einum dysti, sum veruliga kann leggja lunnar undir eitt gott kappingarár.

Onkrir av lyklaleikarunum hjá VÍF vera ikki við, og hetta er ein stórur missur hjá vestmenningum. Agnar Joensen verður ikki við, tí hann hevur brotið økslina. Hann er byrjaður at venja aftur, og verður vónandi við síðst í mánaðinum. Veteranurin, Ingi Olsen, er eisini ivasamur. Hann hevur drigist við ein skaða í tjúkkanum í eina tíð, og hesin darvar enn. Ikki er vist enn, hvørt Ingi verður klárur til dystin.

Hvussu er og ikki, so vilja vestmenningar hava hevnd fyri tapið í finaluni í fjør, so teir fara at gera alt fyri at vinna dystin, sigur Regin Joensen.

– Vit hava arbeitt nógv við tí taktiska síðstu vikuna, so tað sær spennandi út. Vit ætla heilt sikkurt at vinna dystin, so vit kunnu taka eina lítla hevnd eftir finaluósigurin síðsta kappingarár.

### Rókur ivasamur

Hjá Kyndli kemur tað illa við, at Rókur Akralíð hevur drigist við ein skaða. Hann er í Íslandi í løtuni, og tað er ikki enn vist, um hann verður tøkur til dystin í Vestmanna leygarkvøldið. Málverjin, Lars Blak, verður heldur ikki við. Hann er uttanlands í samband við skúlan, men verður tøkur til næsta dystin.Vit frætta, at Johan Danielsen væntandi fer at standa í málinum fyri Lars, men tað verður bert tann eina dystin.

Hans Áki Dahl Christiansen hevur heldur ikki verið við í eina tíð hjá Kyndli, tí hann hevur verið í Danmark í arbeiðsørindum. Hann er tó komin heim aftur, og hetta er ein stórur styrkur fyri Kyndil.

Hjalti M. Jacobsen hjá Kyndli sigur, at teir ætla til Vestmanna eftir øllum stigunum.

– Vit ætla heilt víst eftir báðum stigunum í Vestmanna. Tað er altíð av stórum týdningi hjá okkum at vinna á VÍF, og hesin dysturin er einki undantak. Dystirnir millum Kyndil og VÍF eru nakað serligt, og tí hevur tað stóran týdning fyri okkum at vinna leygarkvøldið.



# Brak í Vestmanna

**Bæði liðini mangla týdningarmiklar leikarar til brakið í Vestmanna. Agnar Joensen verður ikki við hjá VÍF, meðan Ingi Olsen er ivasamur. Hjá Kyndli er Rókur Akralíð ivasamur, meðan málverjin Lars Blak ikki verður við.**

VÍF-KYNDIL
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Atlantic Airways kappingin verður skotin í gongd við einum sonnum braki í høllini í Vestmanna leygarkvøldið kl. 18. Silvurvinnararnir frá í fjør, VÍF, taka ímóti gullvinnarunum úr Kyndli í einum dysti, sum veruliga kann leggja lunnar undir eitt gott kappingarár.

Onkrir av lyklaleikarunum hjá VÍF vera ikki við, og hetta er ein stórur missur hjá vestmenningum. Agnar Joensen verður ikki við, tí hann hevur brotið økslina. Hann er byrjaður at venja aftur, og verður vónandi við síðst í mánaðinum. Veteranurin, Ingi Olsen, er eisini ivasamur. Hann hevur drigist við ein skaða í tjúkkanum í eina tíð, og hesin darvar enn. Ikki er vist enn, hvørt Ingi verður klárur til dystin.

Hvussu er og ikki, so vilja vestmenningar hava hevnd fyri tapið í finaluni í fjør, so teir fara at gera alt fyri at vinna dystin, sigur Regin Joensen.

– Vit hava arbeitt nógv við tí taktiska síðstu vikuna, so tað sær spennandi út. Vit ætla heilt sikkurt at vinna dystin, so vit kunnu taka eina lítla hevnd eftir finaluósigurin síðsta kappingarár.

### Rókur ivasamur

Hjá Kyndli kemur tað illa við, at Rókur Akralíð hevur drigist við ein skaða. Hann er í Íslandi í løtuni, og tað er ikki enn vist, um hann verður tøkur til dystin í Vestmanna leygarkvøldið. Málverjin, Lars Blak, verður heldur ikki við. Hann er uttanlands í samband við skúlan, men verður tøkur til næsta dystin.Vit frætta, at Johan Danielsen væntandi fer at standa í málinum fyri Lars, men tað verður bert tann eina dystin.

Hans Áki Dahl Christiansen hevur heldur ikki verið við í eina tíð hjá Kyndli, tí hann hevur verið í Danmark í arbeiðsørindum. Hann er tó komin heim aftur, og hetta er ein stórur styrkur fyri Kyndil.

Hjalti M. Jacobsen hjá Kyndli sigur, at teir ætla til Vestmanna eftir øllum stigunum.

– Vit ætla heilt víst eftir báðum stigunum í Vestmanna. Tað er altíð av stórum týdningi hjá okkum at vinna á VÍF, og hesin dysturin er einki undantak. Dystirnir millum Kyndil og VÍF eru nakað serligt, og tí hevur tað stóran týdning fyri okkum at vinna leygarkvøldið.

# Spennandi lið møtast í Hoyvík

**Eitt ungt og spennandi lið hjá H71 tekur ímóti einum KÍF-liði, sum tykist sterkari enn undanfarin ár. Hoyvíkingar mangla bert Bjarna Sørensen, meðan kollfirðingar mangla fótbóltsleikararnar og Rógva Weihe.**

H71-KÍF
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sunnudagin taka hoyvíkingar ímóti kollfirðingum í einum dysti, har vit veruliga kunnu fara at síggja styrkina hjá hesum báðum liðunum. Hoyvíkingar hava mist fleiri av stuðulsleikarunum frá síðsta kappingarári, men ungu leikararnir eru klárir til uppgávuna, heldur málverjin.

Vit frætta frá hoyvíkingum, at allir mans eru tøkir. Einasta undantakið er Bjarni Sørensen, sum breyt sær fótin fyri nøkrum vikum síðani. Hann verður neyvan við áðrenn jól. Hoyvíkingarnir hava annars góðar vónir til dystin ímóti KÍF, men málverjin, Levi Nybo, ásannar, at tað er ringt at meta um dystin, tí liðini tykjast sera jøvn í ár.

– Vit ætla okkum sjálvandi at vinna hvønn dyst, men eingin dystur verður lættur. Vit hava eitt ungt lið, so til tíðir kunnu vit fáa tað trupult. Leikararnir eru tó sera spentir, og eg haldi at vit eru ordiliga klárir til uppgávuna ímóti KÍF.

### Veteranar aftur á liðið

Hjá kollfirðingum kom tað illa við, at serbin Damir Oros bleiv skaddur í kapping í Kollafirði fyri tveimum vikum síðani. Skaðin sá alvorligur út av fyrstan tíð, men vit frætta, at so er ikki. Damir Oros hevur vant aftur, og hann verður við til dystin ímóti H71.

Kollfirðingar mangla fleiri av stuðulsleikarunum frá í fjør. Rógvi Weyhe er staddur í Danmark í lestrarørindum, meðan eingin av fótbóltsleikarunum er byrjaður at venja enn.

Annars frætta vit frá kollfirðingum, at allir mans eru tøkir, og at onkur av veteranunum er farin í gongd aftur við venjingina. Bæði Jóan Pauli Olsen og Eddie Joensen vera við hjá kollfirðingum sunnudagin, og hetta er stórur styrkur hjá liðnum.

Kollfirðingar ætla sær annars øll stig í Hoyvík, sigur Karl Johan Djurhuus.

- Vit fara til Hoyvíkar at royna at fáa bæði stigini. Tað hevur gingist væl hjá liðnum í venjing, og hetta vóna vit fer at síggjast aftur í dystinum sunnudagin.